## Kunning um útbúgving



Altjóða skrivstovan skipar saman við EIK og MFS fyri kunningartiltaki til tey, sum eru sloppin inn á eina útbúgving í útlandinum. Týskvøldið 5. august klokkan 19 verður pisukvøld á deildini hjá EIK í Saltangará og mikukvøldið 6. august klokkan 19 á Ungdómsdeildini hjá EIK á Tinghúsvegnum í Havn. MFS, Altjóða skrivstovan og EIK greiða frá lestrarlívi uttanlands og høvi er sjálvsagt at fáa holla ráðgeving og hitta onnur, sum skulu til útlandið at lesa, skrivar ask.fo

## Framvegis møgleiki at sleppa inn

Um tú ikki kom inn ella als ikki søkti um at sleppa inn til útbúgving í Danmark, so ber enn til at sleppa inn til fleiri enn 500 ymiskar útbúgvingar í Danmark. Fram til 9. august sleppa tey, sum eru best skikkaði inn til útbúgvingarnar, eftir 9. august er tað eftir 'først til mølle' prinsippinum, men tó kortini bara so leingi sum pláss er á útbúgvingunum. Les meiri um tey tøku plássini og um upptøkumannagongdina á ingini ella á Altjóða skrivstovuni, skrivar ask.fo

# Tvær nýggjar standmyndir

**Vinarbýarsamstarv, gallaveitsla, tvær nýggjar standmyndir og bókaútgáva eru bert nøkur av tiltøkunum, sum verða, nú Klaksvíkar kommuna fyllir 100 ár**

KOMMUNUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Klaksvík fær tvær nýggjar standmyndir, og Klaksvíkar søga kemur á prent, nú kommunan fyllir 100*

Í næsta mánaði verður hátíðarhald í Klaksvík í sambandi við, at tað eru liðin 100 ár, síðani Klaksvíkar kommuna bleiv skipað sum sjálvstøðug kommuna. Frá 1873 til 1908 var Klaksvík við í kommunufelagsskapinum saman við hinum bygdunum í Norðoyggjum, men síðani 1908 hevur kommunan verið sjálvstøðug.

Í hesum sambandi hevur kommunan skipað fyri fleiri størri og smærri tiltøkum, men sjálvt 100 ára haldið verður í døgunum frá 13. til 16. august við einari sera fjølbroyttari og áhugaverdari skrá.

Tann fyrsta dagin, mikudagin tann 13. august kl. 19.30, verður bókaframløga, tá tað fyrsta av trimum bindum av Klaksvíkar søgu verður lagt fram. Tað eru teir báðir søgumenninir Hans Andrias Sølvará og Jóanes Hansen, sum skriva søguna.

Ein annar áhugaverdur partur av skránni í sambandi við 100 ára haldið er standmyndin, sum listamaðurin Hans Pauli Olsen hevur gjørt niðan fyri gamla kirkjugarð, og sum verður avdúkað leygardagin 16. august kl. 18. Millum tey hjástøddu verða Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, og Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í kommunumálum.

100 ára føðingardagurin hjá Klaksvíkar kommunu verður flættaður saman við árligu sjómannadagarnar í Klaksvík.

**SKRÁIN**

Bókaútgáva – Klaksvíkar søga; fyrsta bind av trimum
Hans Andrias Sølvará, Jóannes Hansen
13.08.08. Mikudag kl. 19.30

Standmynd – Bókasavnið, Joel Cole
14.08.08. Hósdag kl. 19.30

Vinarbýarfundur
15.08.08. Fríggjamorgun kl 09.00 – 13.00

100-ára konsert – Badmintonhøllin
15.08.08. Fríggjakvøld kl 21.00 – 23.00

Avdúking standmynd niðanfyri gamla kirkjugarð – Hans Pauli Olsen, Borgarstjórin, Landsstýrismaðurin í Kommunumálum – 16.08.08. Leygardag kl. 18.00

Gallaveitsla í Badmintonhøllini
16.08.08. Leygardag kl. 19.00

Fýrverk í miðbýnum
16.08.08. Leygarkvøld kl. 24.00

100-ára dansur í Badmintonhøllini
16.08.08. Leygarnátt kl. 01.00

# Bankapartabrøv í útsølu

**Fleiri privatir íleggjarar verða kanska noyddir at selja síni partabrøv í næstum, og tað kann gerast ein trupulleiki fyri partabrøv í bankunum**

VIRÐISBRØV
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tey seinnu árini hava fleiri danskir íleggjarar keypt sær partabrøv í teimum minnu bankunum, og sambært Børsen hava hesir fingið nakað at hugsa um, nú virðið á fleiri bankapartabrøvum er fallið nógv. Úrslitið verður helst, at teir fara at selja burturav, og tá tað er langt ímillum keypararnar á virðisbrævamarknaðinum, kann tað trýsta virðið uppaftur longri niður, um ikki bankarnir sjálvir keypa.

Børsen nevnir fleiri privatar íleggjarar, sum hava sett pengar í partabrøv í teimum minnu bankunum. Felags fyri teir er, at teir hava mist nógv orsakað av fallinum á partabrævamarknaðinum, og sambært Børsen fara fleiri teirra at selja burturav sínum bankapartabrøvum í næstum. Onkur hevur longu selt partabrøv í smáum bankum og keypt í teimum stóru ístaðin fyri.

Fleiri keldur í danska bankaheiminum siga fyri Børsen, at virðið á partabrøvunum í teimum smáu bankunum kann koma undir stórt trýst, um teir stóru íleggjararnir kenna seg noyddar at selja.

Millum teir smáu bankarnar á danska virðisbrævamarknaðinum eru Eik Banki og Føroya Banki.



*Partabrøvini í teimum báðum føroysku bankunum kunnu enda á útsølu*